# Oyrargjógv í søguna



*Bussførarin Tage Jørgensen letur manninum á Ternuni seinasta postin, ið skal flytast um Vestmannasund*

**Mánadagin fór seinasti posturin úr Vágum um sundið, og nú er koyringin á Oyragjógv eisini hildin uppat. Tage Jørgensen hevur koyrt buss í Vágum síðan 1987, tá hann tók yvir eftir verfaðir sín, og hann koyrdi seinasta postin til Ternuna**

FAST SAMBAND
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Millum tíðum nógvu ferðsluna við ferjuleguna á Oyragjógv eru bláu bussarnir hjá Bygdaleiðum. Væl heilsaðir av ferðafólki av Ternuni uttan egnan bil, meðan onkur eiðurin helst er sagdur yvir teir, tá teir hendingaferð hava smoygt sær fram við langu bíðirøðunum og umborð á ferjuna, ið langt frá rúmaði øllum.

Ein av teimum, ið hevur havt sína koyring á Oyrargjógv er bussførarin Tage Jørgensen. Hann byrjaði at koyra buss í 1987, tá hann tók yvir eftir verfaðir sín, og hann hevur eisini koyrt buss síðan. Nú eru túrarnir á Oyragjógv ein farin tíð.

- Eg veit ikki, hvussu verður nú. Eg havi enn ikki fingið at vita neyvt, hvussu eg skal koyra, men onkran túr skal eg helst til Havnar, sigur Tage Jørgensen.

Ein av hansara uppgávum hevur verið at flyta postin úr Vágum umborð á Ternuna. Mánadagin fór síðsti posturin umborð á Ternuna.



*Nú fasta sambandið verður tikið í nýtslu, steðgar somuleiðis koyringin hjá bygdaleiðum á Oyragjógv*








# Seinastu ferð á brúnni um Sundið

**Týsdagin stóð Sofus Jacobsen á brúnni, seinasta túrin hjá Ternuni um Vestmannasund. Í 22 ár hevur farleiðin um sundið verið hansara arbeiðspláss**



*Í nærum 22 ár hevur farleiðin um Vestmannasund verið arbeiðsplássið hjá Sofusi Jacobsen. Hann stóð á brúnni, tá Ternan legði at bryggju í Vestmanna fyri seinastu ferð týsdagin, og har kemur hon at liggja fyribils*

*Mynd: Jan Múller*

FAST SAMBAND
*Jón Brian Hvidtfeldt*

– Jú, tað kennist óveruligt, at eg nú skal leggja bátin við bryggjuna fyri seinastu ferð. Sundið hevur verið mítt arbeiðspláss í útvið 22 ár. 59 ára gamil Sofus Jacobsen er annar av skiparunum á Ternuni. Manningin arbeiðir í tveimum vaktum, eina viku umborð og eina í landi, og hesa vikuna eigur Sofus tørn sum skipari, meðan Karmal Olsen er í landi.

Sofus Jacobsen byrjaði hjá Strandferðsluini á Krossmessu í 1968 og hevur sostatt verið í reiðarínum í útvið 35 ár. Hann byrjaði umborð á gamla Smyrli, var síðan við »nýggja« Smyrli, men seinastu 22 árini hevur farleiðin um Vestmannasund verið hansara arbeiðspláss. Nú fasta sambandið undir sundið verður tikið í nýtslu, verður siglingin niðurløgd. Og nú fer Sofus so aftur umborð á Smyril.

– Ja, vit hava allir fingið bræv frá Strandferðsluni. Eingin er uppsagdur, og tað er sjálvandi at gleðast um. Men nú fara vit so í hvør sína ætt. Nakrir fara at sigla um Leirvíksfjørð, onkur fer til Skálafjarðarleiðina, og sjálvur skal eg umborð á Smyril. Fleiri av okkum við Ternuni hava arbeitt leingi saman. Millum annað hava eg og meistarin siglt saman øll árini. Tí kennast vit, bæði uppá gott og ringt, leggur Sofus afturat.

Samtíðis sum teir 12 menninir fara umborð á hini skipini hjá Strandferðsluni, verður Ternan løgd á Vestmanna.

– Eg veit ikki, hvat fer at henda, men fyribils verður hon so løgd í Vestmanna. Tað er eitt sindur »vemodugt« at hugsa sær, at hon nú bara fer at liggja við bryggjuna. Har hevur jú verið eitt sindur av lívi í. Vit hava pendlað eini 15 ferðir aftur og fram um dagin, og eitt sindur av aktiviteti hevur tað ført við sær, sigur Sofus Kacobsen.

Í mong ár var Sam álitið um Vestmannasund, men síðan 1994 hevur Ternan burturav verið nýtt til hesa farleið.

– Eg minnist, at í fyrstani hildu menn ikki, at tað fór at ganga at sigla við Ternuni um sundið um veturin. Men eg má siga, at hon hevur roynst væl. Eisini hevur hon skift høvuðsmotorar, og tað gjørdi stóran mun, greiðir Sofus Jacobsen frá. At talan hevur verið um eitt gott arbeiðspláss ivast hann ikki í.

– Ja, eg má siga, at vit hava havt nógvar góðar løtur umborð. Her ferðast 40-50 fólk fast aftur um fram hvønn dag, umframt onnur, sum sigla ofta, og tað skerst ikki burtur, at vit sum frálíður koma at kenna tey. Sjálvur búgvi eg í Kvívík, og hóast arbeiðsplássið er á sjónum, so sleppi eg heim hvørt kvøld – tað er ikki so galið, leggur skiparin afturat.

### Tíðarpress

Skiparin á Ternuni greiðir frá, at serliga um sumrarnar hevur verið nógv sigling. Í meðal hava teir siglt 100 túrar um mánaðin afturat teimum, ið standa í ferðaætlanini, tí bíðirøðiðrnar hava verið langar, og fólk ótolin.

– Eg vil siga, at tíðin hevur blást okkum í nakkan alla tíðina, men kanska hava vit sjálvir skyldina. Tá ferðslan hevur verið nógv, hava vit roynt at siglt oftari – at kroyst onkran túr innímillum í ferðaætlanini. Av tí sama hava vit kanska ikki altíð siglt so neyvt til tíðina, leggur Sofus afturat.

Hann greiðir frá, at millum ár og dag er onkur skolan komin frá ferðafólki, ið hava staðið eftir á bryggjuni, tá Ternan hevur loyst.

– Onkuntíð hava fólk verið óð ella kedd, tí tey hava hildið, at vit hava siglt undan. Men eisini er komið fyri, at fólk hava verið fegin og takkað fyri, tí vit hava bíðað eftir teimum.

Sofus Jacobsen leggur afturat, at eisini hava fólk viðhvørt ilskast inn á, at bussarnir skulu við, samtíðis sum bíðirøðin av persónbilum hevur verið kilometralang.

– Men eg haldi tó, at kanska serliga vágafólk hava dugað væl at passa seg eftir túrunum, og nær møguleikin hevur verið bestur at sleppa við. Eisini hava vágafólk, ikki minst vinnulivið, dugað at skilja støðuna, eisini tá teirra bilar hava staðið eftir á bryggjuni.



*Trúgv hevur Ternan flutt fólk og bilar um sundið, men við fasta sambandinum er siglingin og eisini langu bíðirøðirnar á Oyragjógv farnar í søguna.*

*Mynd: Jan Múller*